# Stóri vinnarin hevði Helga sum fyrimynd

**– Helgi Winther Olsen er ein fimleikari, sum eg altíð havi sæð upp til, sigur Alex Hedges, sum vann heili fýra gullmerki í fimleikakappingini mikudagin**

FIMLEIKUR
*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** – Helgi er framúr góður fimleikari. Eg havi kappast ímóti honum í eini seks ár nú, men eg hugdi eftir honum tvey ár frammanundan, og hann hevur verið ein fyrimynd fyri meg. Hann var ein fimleikari, sum eg altíð havi sæð upp til, sigur Alex Hedges av Isle of Man.

Hann hevur seks heiðursmerki hangandi um hálsin, nú hann stendur við einum stórum smíli eftir einstaklinga kappingina í fimleiki.

Fýra gullmerki, eitt silvur- og eitt bronsumerki. Alex Hedges er stóri vinnarin á degnum, tá ið Helgi Winther Olsen gjørdist føroyska hetjan í fimleiki.

### Vil til Føroya at kappast

– Tað er stuttligt at kappast ímóti Helga, og tú kanst veruliga kenna teg stoltan, um tú klárar at vinna, tá ið Helgi er við. Tú hevur gjørt nakað serliga gott, um tú klárar at vinna á honum.

– Oyggjaleikirnir eru ein fantastisk kapping, og tí er tað spell, at vit ikki eru við um tvey ár. Men eg gleði meg til Áland um fýra ár, tá ið vit aftur verða við aftur. Og um tvey ár rokni eg við, at vit gera eina kapping í fimleiki. Isle of Man hevur bjóðað seg fram, og tað hava Føroyar eisini. Eg kundi veruliga hugsa mær at sloppið til Føroyar at kappast, sigur Alex Hedges.



*– Eg kundi veruliga hugsa mær at sloppið til Føroyar at kappast, sigur Alex Hedges, sum mikudagin vann seks heiðursmerki – harav fýra gull – í fimleikakappingini fyri einstaklingar*




*Ein fegin gullvinnari og tvey stolt foreldur. Pápin Sølvi og mamman Anna Maria saman við tí gylta Helga Winther Olsen*

# Helgi ruddaði gólvið

**Helgi Winther Olsen gjørdi bart í einstaklingakappingini í fimleiki mikudagin. Hann vann heili tvey gullmerki, og tá var hann ikki við í kappingini, har hann plagar at vera tryggur vinnari. Harafturat vann Høgni Øster bæði silvur og bronsu**

FIMLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Scalloway:** Menninir gjørdu ein ordans vørr í einstaklinga kappingini í fimleiki mikudagin.

Eftir at kvinnurnar als ikki megnaðu at gera seg galdandi og ongantíð komu í nánd av einum heiðursmerki, var annað flog yvir mannligu fimleikarunum.

Helgi Winther vann gull bæði á gólvinum og parallellu barrunum, og tá var hann ikki við í ringunum, har hann plagar at vera nógv tann sterkasti fimleikarin.

– Hetta er stórt, hetta er deiligt, og hetta er meira, enn eg hevði væntað. Skuldi tað eydnast at vinna gull, so skuldi nógv passa saman. Eg skuldi gera mítt so at siga perfekt, og so skuldi hinir helst ikki gera tað sama. Og hinir høvdu nøkur smá kiks, og eg gjørdi mítt so gott, sum eg yvirhøvur kundi, sigur Helgi Winther Olsen.

Ein skaði í arminum forðaði fyri, at hann var við í ringunum, men hann var tó førur fyri at kappast í øðrum av greinunum, sum vóru á skránni mikudagin.

Høgni Øster var heldur ikki eiðasørur. Hann fekk tvey heiðursmerki, sum hann kundi fegnast um. Høgni vann bronsu í lopi og silvur í barrunum.

### Kundi vunnið í ringunum

Hvussu vóru vónirnar hjá tær til dagin í dag, nú tú ikki kundi verða við í ringunum?

– Tá ið eg nú sá teir kappast í ringunum í dag, so eri eg ógvuliga keddur um, at eg ikki kundi kappast har, tí eg eri fullvísur í, at eg væl og virðiliga kundi tikið teir. Skuldi eg frammanundan sagt, hvar eg kundi gull, so var tað í ringunum.

– Men eg eri sera glaður fyri hesi gullmerkini. Ikki minst tað á gólvinum, tí tað er tað, sum eg havi sæð sum mítt merki gjøgnum longri tíð. Fyri tveimum árum síðani kiksaði eg nokk so illa á gólvinum, men eg vann eina bronsu. Bara tað, at alt riggaði í dag, var gott. Eg gjøgnumførdi alt og stóð, sum eg skuldi. Tá ið tað so eisini førir gull við sær, so verður tað ikki størri, sigur Helgi Winther Olsen.

### Teiru ungu royndu seg eisini

Fýra føroyskir fimleikarar vóru við í einstaklinga kappingini mikudagin. Umframt teir báðar heiðursmerkjavinnararnar, vóru eisini teir ungu Rósing Dam og Øssur Eiriksfoss við í onkrum av kappingunum.

Bæði Øssur og Rósing royndu seg á gólvinum og teir endaðu sum ávíkavist nummar 9 og 10 av 13 fimleikarum. Í ringunum blivu teir nummar 7 og 8 av 9 luttakarum.

Umframt Føroyar vóru eisini Jersey, Gibraltar, Isle of Man og Ynes Mon við í kappingini mikudagin.

Isle of Man gjørdist stóri vinnarin samanlagt, tí tann sera evnaríki Alex Hedges vann heili fýra gullmerki í kappingunum. Eitt av gullmerkjunum var fyri besta samanlagda avrikið á degnum. Umframt tey fýra gullmerkini fekk Alex Hedges eisini eitt silvurmerki og eitt bronsumerki.